## DAGSINS MEINING

# Kolveltandi oljuavtala

Dagurin 8. desember 2005 kann gerast ein týðandi merkisdagur, tá framtíðar oljusøga skal skrivast. Henda dagin - tvs. í dag - varð nevniliga avtala undirskrivað í Oljufyrisitingini millum 8 oljufeløg um at royna heilt nýggjar oljuleiðir á føroyska landgrunninum.

Avtalan ber í sær, at latið verður uppaftur fyri boring á landgrunninum, nú steðgur hevur verið í í fleiri ár. Tey 8 oljufeløgini við norska Statoil á odda fara at seta borin í basaltið inni á landgrunninum um gott og væl eitt hálvt ár. Hetta verður fyrsta veruliga royndin hjá oljufeløgunum at bora gjøgnum tjúkku basaltfláirnar í føroysku undirgrundini. Tað er ein sera stór avbjóðing og samtíðis eisini eitt vegamót í oljuleitingini. Frá at hava lagt alla orku í at bora í einum avmarkaðum øki har suðuri og eystari á landgrunninum, har einki ella lítið basalt var, verður fokus nú flutt inn á eitt nærum fremmant og ókent øki men tó á eitt øki, sum kann goyma ókendar loynidómar og stór virði.

Sjálvandi eru stórir váðar knýttir at hesi boring men samtíðis kann hon eisini lata upp fyri einum heilt nýggjum kapitulli í leiting um okkara leiðir, har tað aftur og aftur hevur verið tosað um at fáa loyst basaltknútin tvs. at síggja hvat goymir seg undir basaltinum. Tað sleppur nú at standa sína roynd og er boripallur funnin. Stena Don skal finna oljuna undir basaltinum.

Herfyri varð ein líknandi avtala gjørd millum trý oljufeløg við BP á odda um á sama hátt at flyta boriskyldur úr landssynningshorninum og inn á basaltið. Tann brunnurin verður boraður í 2007. Føroysk vinna hevur seinastu dagarnar víst á, at tað er óheppið, at brunnarnir ikki verða boraðir sama ár, men sum skilst, so hevur tað ikki eydnast BP samtakinum at fáa ein boripall komandi ár.

Tað er eingin ivi um, at tey í Oljufyrisitingini nú kunnu fáa ró í sinni, tí hetta hevur verið ein hektisk bíðitíð. Men tolin trívst, og tað hevur henda søgan so prógvað. Vónandi hava oljufeløgini fingið tað burtur úr, sum tey kunnu vera nøgd við, og vónandi er hetta eisini tað besta, sum kundi henda fyri føroyskar oljumyndugleikar. Tí nú fáa vit eftir øllum at døma ta best hugsandi leitingina. Øll orsøk er til at ynskja bæði oljufeløgunum og góðu manningini í Oljufyrisitingini tillukku og góða eydnu. At fýra brunnar eru vornir til tveir kann gerast lykil til eina føroyska oljuframtíð.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tápulingar, og meiningsleysir pinkulingar!

**Jákup á Stongum**
*Fo-380 Sørvágur*



Halda tit virkuliga at tit eru settir at umsita eina danska lóg, og at tykkara tilmæli so skal til danmarkar at at fáa stempul sum t.d:"Godt klaret færinger" -kontra- "Ups! Den var ikke så god?" Heilt erligt! Munnu danir ikki klára tað sjálvir?

Jú víst hava tit lov at hava eina meining! Hvør man koma eftir tykkum?

Skulu vit virkuliga trúgva at tað er soleiðis tað gongur fyri seg?:

Be.be....be,be,be! Nú hevur hon bíða í 14 mánaðar! So nú mugu vit siga við politiðið at vit tora ikki at viðmæla arbeiðsloyvi, tí so fara danir at spyrja: Hey!..... hey! hey! Hvat munnu tit billa tykkum inn? Ætla tit at bróta eina danska lóg í Føroyum? Eller hvad?

Jú! Víst hava tit lov til at hava tykkara meiningar! Og tað gera tit eisini......tá tit endiliga tora út úr buskinum, gera tit tað. Tit mæla til! Góðu pinkulingar! Tit fara enntá afturum málið tá tað tænir tykkara søk.

At brúka lógir til at skapa øsing og ósemjur millum fólk, tilkemur vælsagtans teimum ómetaliga fátæku í ándini! Vanliga verður farið í løgbøkurnar tá ósemjur skulu greiðast.

Hvørji eru tey ósamdu í hesi søk?

Grát mítt elskaða land? Kanska tað! men hví ikki siga tað vit virkuliga meina? ................Fuck You!

# Sladjana Petrovic - Vælkomin at verða verandi

**Marjus Dam**
*løgtingslimur og limur í rættarnevnd løgtingsins*



Eg góðtaki ikki handfaringina og noktan av arbeiðsloyvi í Føroyum til Sladjanu.

Sum fólkavaldur og í samgongu, so skildi eg ikki hesa handfaring. Í samgonguni hava vit fleiri ferðir tosa um hesi viðurskiftir hjá útlendingum, júst fyri at sleppa undan óhepnum avgerðum sum hesari. Og so kemur hendan skammiliga avgerðin - beint undan jólum afturat.

Míni ráð eru hesi. Far ikki av landinum. Arbeiðsloyvi má og skal koma til tín og tey, ið eru í somu støðu.

Í Føroyum eru vit bert menniskjur, og tað er tú eisini. Vit eiga at virða og verða góð við hvør annan. Vit í Føroyum hava sanniliga havt brúk fyri at fari í onnur lond av arbeiða og liva. Og tað hava vit verið takksom fyri. Serliga, tí vit hava verið væl móttikin har vit eru komin.

Tú og familjan eru vælkomin í Føroyum, eins og vit eru vælkomin í útlondum.

Eg skal gera mítt til at hendan ómenniskjaliga avgerð verður broytt til eitt játtandi svar. Tí ongum øðrum kunnu vit liva við.

Tú og familjan hava gjørt eitt gott arbeiði her í Føroyum. Vit eru mong í takka tykkum fyri tað. Tit eiga og skulu sleppa at halda fram við at gera eitt gott arbeiði her á landi - tað vilja eg og mong onnur stríðast fyri.

Og vit vinna. Tí tað er rætt.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.